# Ternan verður gjørd Nólsoyarklár

**Í síðstu viku fór Strandfaraskipið Ternan á beding hjá MEST í Havn, at hon skal gerast klár til at reka farleiðina um Nólsoyarfjørð**


*Ternan stendur nú á beding á MEST í Havn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**STRANDFERÐSLA**

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú er ein tíð liðin, síðani tilboðini upp á at umvæla tey bæði strandfaraskipini, Ternuna og Rituna, vórðu latin upp, og tað endaði við, at MEST fekk arbeiðið upp á Ternuna, meðan eitt samtak úr Suðuroy, Vágs Skipasmiðja og Bærentsen Teknik, fekk Rituna at umvæla.

Farið varð so undir arbeiðið upp á Ternuna í síðstu viku, tá skipið var hálað upp á bedingina hjá MEST í Havn.

- Skipið skal yvirhálast. Lyfta skal setast í, saniteru viðurskiftini skulu fáast í stand, eins og yviskar ábøtur skulu gerast í salongini, so komforturin verður betri. Hartil skal hon eisini vatnblásast og málast, sigur Bogi Mortensen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins.

Tilboðið hjá MEST ljóðaði upp á 1,8 milliónir krónur, men upprunaliga varð tosað um eina upphædd upp móti sjey milliónum.

- Tað er ikki alt við í hesum tilboðnum. Eitt nú vórðu vit noydd at bíleggja lyftina longu í fjør, tí leveringstíðin er so long, og eisini onnur viðurskifti vórðu aktiverað í fjør. Samlaða upphæddin fer helst at liggja millum fýra og fimm milliónir, sigur Bogi Mortensen.

## Síðst í mars

Men eitt er at fáa Ternuna í brúkiligan stand, nakað annað er at gera tað møguligt hjá skipinum at leggja at í Nólsoy.

- Vit vóru í fjør í rímiliga góðari tíð úti og skitseraðu tað, vit ætlaðu yvirfyri Tórshavnar kommunu, tað er jú teirra borð. Eg haldi teir vóru avkláraðir um, hvat teir ætlaðu, men nágreiniliga hvat tað málið liggur, veit eg ikki, sigur stjórin á Strandferðsluni.

Men nær kann so væntast, at Ternan verður klár at seta í sigling um Nólsoyarfjørð.

- Eg rokni við, at arbeiðið upp á Ternuna verður liðugt síðst í mars. Tað, sum verður avgerandi fyri tíðina, er lyftan, ið hevur eina leveringstíð. Vónandi heldur tað, men tað er sum nevnt tengt at, nær lyftan verður klár, sigur Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni.

## VEÐRIÐ


Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, um kvøldið minni vindur av landsynningi. Regn eitt skifti og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og møguliga regn um morgunin, annars turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul millum útnyrðing og landnyrðing og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | |
| Aberdeen | 4 |
| London | 5 |
| Tromsø | -3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -5 |
| Stokkhólm | -3 |
| Keypmannah. | -3 |
| Helsinki | -10 |
| Moskva | -15 |
| Berlin | -11 |
| Warzawa | -13 |
| Kiev | -16 |
| Bukarest | -13 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 6 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 32 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 993 hPa. sunnan fyri Føroyar fer spakuliga í landnyrðing

**Komandi nátt:**
Stormlágtrýstið vestan fyri Írland fer spakuliga eystureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani kemur spakuliga hendavegin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/01 kl. 06⁰⁰ – 25/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° -
Mesti hiti máldur í februar: +11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 24/01 kl. 06⁰⁰ – 25/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í februar: 0 mm




Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

30. januar — Mánin næstur jørðini/ Fullmáni
5. februar — Seinna kvarter
13. februar — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. feb | 10:34 | 23:12 | 09:34 | 22:12 | 09:49 | 22:27 | 00:09 | 12:34 | 01:09 | 13:34 | 08:49 | 21:27 | 07:49 | 20:27 | 10:49 | 23:27 | 11:49 | - | 10:19 | 22:57 | 11:34 | - |
| 5. feb | 11:50 | - | 10:50 | 23:15 | 11:05 | 23:30 | 01:12 | 13:50 | 02:12 | 14:50 | 10:05 | 22:30 | 09:05 | 21:30 | - | 12:05 | 00:27 | 13:05 | 11:35 | - | 00:12 | 12:50 |
| 6. feb | 00:15 | 13:08 | - | 12:08 | - | 12:23 | 02:15 | 15:08 | 03:15 | 16:08 | 11:23 | 23:48 | 10:23 | 22:48 | 00:30 | 13:23 | 01:30 | 14:23 | 00:00 | 12:53 | 01:15 | 14:08 |
| 7. feb | 01:33 | 13:58 | 00:33 | 12:58 | 00:48 | 13:13 | 03:33 | 15:58 | 04:33 | 16:58 | - | 12:13 | 11:13 | 23:38 | 01:48 | 14:13 | 02:48 | 15:13 | 01:18 | 13:43 | 02:33 | 14:58 |
| 8. feb | 02:23 | 14:48 | 01:23 | 13:48 | 01:38 | 14:03 | 04:23 | 16:48 | 05:23 | 17:48 | 00:38 | 13:03 | - | 12:03 | 02:38 | 15:03 | 03:38 | 16:03 | 02:08 | 14:33 | 03:23 | 15:48 |